## Túgvusteinur farin nýggjan túr

Leygardagin fór Túgvusteinur úr Hósvík nýggjan túr. Túgvusteinur roynir eftir krabba og tað hevur gingið rímiliga væl. Við bátinum eru 12 mans. Skiparin er ættaður úr Húsavík. Sum skilst landar báturin í Skotlandi.



## Sandavágur nýggjan borgarstjóra

Eftir at hava verið næstformaður hevur Jógvan Sjúrður Hansen (myndin) nú tikið við sum borgarstjóri eftir at Rósa Samuelsen er farin í landsstýrið. Hann hevur sitið í mong ár í bygdaráðnum, men er ikki vísur í um hann stillar upp til kommunuvalið. Í dag er fólkaatkvøða í bygdini um samanlegging við Miðvág, og við Vágaportalin sigur hann, at um hon vísir eitt nei, so metir hann, at bygdarráðið fer at taka tað til eftirtektar. - Men sjálvandi verður tað eisini avgerandi fyri fólkaatkvøðuna, hvussu høgt luttøkuprosentið er, leggur hann afturat, og vísir á, at á seinastu fólkaatkvøðu var luttøkan yvir 90%, men at tá var eisini løgtingsval. - Hvussu nógv fólk fara at atkvøða nú, vita vit ikki, men luttøkan verður neyvan so stór sum seinast, sigur Jógvan Sjúrður Hansen við Vágaportalin.

# Thor møguliga byggja tvey nýggj skip á Skála



*Thor Omega við bryggjuna í Assesns.*
*Mynd Jan Müller*

SKIPABYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

So mikið væl hevur gingið við teimum báðum fyrstu frálandaskipunum, sum Thor hevur latið byggja á Skála, at leiðslan í felagnum í løtuni kannar fíggingarmøguleikarnar fyri at byggja tveir skip aftrat av sama slag. Hetta sigur stjórin í felagnum, Hans Andreas Joensen, nú seinna skipið varð navngivið í Assens seinnapartin leygardagin. Skipið fekk navnið Thor Omega. Fyrra skipið er Thor Alfa.

Í sambandi við navngevingina hevði Thor boðið handverkarum og øðrum við til Assens. Sosialurin og Rás2 vóru eisini við og fara vit í Vinnuinnlegginum í Sosialinum týsdagin og í vinnusendingini á Rás2 seinnapartin týsdagin at kunnað um áhugaverdu løtuna, tá Thor Omega varð doypt og siglt varð til Middelfart. Skipið er eins og tað fyrra langtíðarchartrað til stóra frálandareiðaríið Fugro Geoteam.



*Gunnbjørn og Hans Andreas Joensen saman við foreldrunum umborð á Thor Omega.*
*Mynd Jan Müller*

# Íslendska stjórnin bjargar Glitnir

**Íslendska stjórnin traðkar nú til at bjargar stórbankanum Glitnir, sum var hoyknaður undir trýstinum av øktu fíggjarkreppuni seinastu tvær vikurnar. Stjórnin yvirtekur nú 75% av bankanum fyri 600 milliónir evrur og ðutskrivar nýggj partabrøv**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nevndin og størstu partaeigararnir hava góðtikið prísin áljóðandi 600 milliónir evrur, svarandi til 4,475 milliardir krónur, og bjargingin skal nú bert góðkennast á einum eykaaðalfundi.

Tað kemur fram í einari nýggjari fondsbørsfráboðan, har nevndarformaðurin heilt friðar leiðsluna og upplýsir, at stjórnin er komin bankanum til hjálpar í eini roynd at styrkja solvensin og likviditetin hjá Glitnir.

Fundingin hjá Glitnir hevur verið heppin í ár hóast ógvuliga avbjóðandi marknaðarumstøður. Kortini hava tær hendingar, sum eru farnar fram seinastu tvær vikurnar, ført óvæntaðar avleiðingar við sær, sum drastiskt hava broytt fyritreytirnar í stuttsiktaða fundingini hjá Glitnir, sigur leiðslan í einum tíðindaskrivi.

Seinastu vikurnar hevur íslendski tjóðbankin havt tætt samband við leiðsluna í Glitnir, har kreditttru-pulleikarnir eru øktir dag um dag. Og í gjárkvøldið valdu myndugleikarnir so at steðga sjálvstøðu bankans og gjørdu av, at fremja bjargingarætlanina, og kallaði inn til nevndarfund í morgun.

### Ongar ábreiðslur

Har var samstundis gjørt av, at forstjórin í bankanum, Lárus Welding, heldur fram sum forstjóri fyri Glitnir, sum nú í »hondum stjórnarins« framhaldandi verður sterkur, sum Lárus Welding málber seg.

Nevndarformaðurin friðar eisini leiðsluna og vísir á, at einki hevur verið at sett fingurin á í handilshættum og trygdarstýring bankans.

- Eg havi undirstrikað øktan effektivitet í handlunum hjá bankanum. Eg harmist um, at vit ikki hava kunna loyst hetta sum vit upprunaliga høvdu ætlað, sigur Thorsteinn Már Baldvinsson, nevndarformaður fyri Glitnir Bank.

- Niðurstøðan má nú verða at tryggja framtíðina hjá bankanum, hjá kundunum og hjá starvsfólkunum. Hetta hevur nógv at siga fyri meg. Okkara starvsfólk hava útint eitt stórt arbeiði undir sera truplum marknaðarviðurskiftum, sigur Thorstein Már Baldvinsson, nevndarformaður fyri Glitnir Bank sambært danska blaðnum Børsen.




*Lárus Welding, forstjóri í Glitnir, heldur fram sum forstjóri í bankanum*